## Máltindarnir

**1. deild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Neistin | 122 | (19) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 108 | (26) |
| Nicoleta Radu | Søljan | 105 | (20) |
| Ioana Rápa | VÍF | 95 | (24) |
| Katarina Stepanov | Stjørnan | 84 | (19) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 81 | (19) |
| Daiva Tuomaite | VB | 80 | (15) |
| Gurið Mortensen | VB | 75 | (6) |
| Annika Ljósstein | Stjørnan | 72 | (18) |
| Nikolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 70 | |
| Irina Rodevici | VÍF | 68 | |
| Milica Ergic | StÍF | 66 | (8) |
| Joan M. Djordjevic | Stjørnan | 64 | (22) |
| Heidi Maria Akselsen | Søljan | 62 | (4) |
| Rannvá Augustinussen | VB | 56 | |

**1. deild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Halgir D. Olesen | H71 | 87 | (9) |
| Dragisa Stojovic | Neistin | 82 | (3) |
| Blagoje Buha | Neistin | 81 | (21) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 81 | (29) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 61 | |
| Ingi Olsen | VÍF | 60 | (20) |
| Agnar Joensen | VÍF | 55 | (5) |
| Áki Mørk | Neistin | 50 | (8) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 50 | (20) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 48 | |
| Artur Johansen | StÍF | 48 | (9) |
| Høgni Klein | Kyndil | 47 | (2) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 45 | (4) |
| Sámal Joensen | VÍF | 44 | (6) |
| Damir Oros | KÍF | 44 | (15) |



*Halgir Dahl Olesen hevur nú lyft seg upp á toppin av føroysku máltindunum. 87 kassar hevur talan verið um hesar fyrstu 11 dystirnar*

VB-Søljan 28-24 (13-8):

# VB helt skansanum



*Fyri tað nógva tók VB sær av løttum, tá Søljan vitjaði, men tað skerst ikki burtur, at vágakvinnurnar hava tikið stór framstig hetta kappingarárið*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

**Søljan gav í longum løtum góða mótstøðu til VB, men í seinasta enda var tað ikki nóg mikið til at taka stig við sær norður um Suðuroyarfjørð**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*

*jakup@sosialurin.fo*

Føroyameistararnir úr VB høvdu á pappírinum eina av teimum meira yvirkomuligu uppgávunum, tá tær sunnudagin høvdu vitjan av Søljuni.

Søljan hevur fyri tað mesta verið á niðaru sessunum, tá tær hesi seinnu árini hava verið í fyrstu deild, og í so máta hevur árið í ár ikki verið nakað undantak.

Men seinnu umførini hava verið greið tekin um, at leikliga eru vágakvinnurnar nú um at koma fyri seg, og móti VB góvu tær enn einaferð prógv um, at tær so avgjørt ikki eru sjálvskrivaðar sum dumpikandidatar.

### Eingin spenningur

Tí hóast VB kanska ikki hevði ein av sínum bestu døgum, og hóast Søljan sum so ongantíð var heilt nær eini sensatión, so megnaðu tær fyri ein stóran part av stríðast ímóti yvirvaldinum í høllini í Vági.

Eina lítlu í fyrra hálvleiki fekk VB tó sett alt upp á pláss, tá tær lupu frá 4-3 upp á 10-3, men eftir hetta var tað tó so sum so við motivatiónini hjá liðnum. Tað gav so eisini Søljuni møguleikan at koma við í dystin, gog tá VB ikki tóktist taka sær tað heilt stóra fyri í verjupartinum, so byrjaði Søljan at toga aftur í á máltalvuni.

VB helt seg tó alla tíðina eina 4-5 mál frammanfyri, soleiðis at støðan ikki skuldi gerast alt ov spent, men tó at hetta ongantíð hendi, so mundi tað fyri fleiri av heimaáskoðarunum kennast so, at hetta avrikið ikki var nakað at rópa hurrá fyri.

Onkur teirra mundi taka til, at skuldi hetta vera lagið, so fór at standa illa til, tá VÍF og Stjørnan verða mótstøðuliðini næstu ferðirnar, men hinvegin man vandin fyri tí støðuni ikki vera tann heilt stóri. Tá verður tað undir øllum umstøðum eitt væl meira uppsett VB-lið, sum fer á vøllin, og einki er at ivast í, at tær tá fara at koyra á við fullari kraft gjøgnum allar 60 minuttirnar.

### Líta frameftir

Tað skal tó einki takast frá Søljuni av hesi orsøk. Seinastu vikurnar er fleiri ferðir havt á munni, at liðið hevur gjørt stór leiklig framstig, og einki er at ivast í, at tær eru farnar at síggja fram til dystirnar, har tær skulu hitta hini bæði liðini, sum tykjast vera partur av botnstríðnum. Enn er so ikki greitt, nær dysturin móti StÍF verður leiktur, men hartil eru so eisini dystir móti Kyndli, og einki er at ivast í, at Søljan fer eftir stigunum í hesum uppgerðunum.

### Dysturin í tølum

**VB-Søljan 28-24 (13-8)**

**Málskjúttar**

**VB:** Daiva Toumaite 12(3), Aukse Vysniaskaite 5(3), Gurið Mortensen 5, Eydis Kjærbo 3, Laila Jespersen 2, Margreth Augustinussen 1

**Søljan:** Nicoleta Radu 12(2), Heidi-Maria Akselsen 4, Arnley Haraldsen 4, Irdi Mikkelsen 2, Fía Selma Nielsen 1, Jana Jacobsen 1

**Brotskøst:** VB 8, Søljan 3

**Útvísingar:** VB 1, Søljan 4

**Dómarar úr TB:** Birgir Dimon & Kári Niclasen.

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 3 | 3 - 0 - 0 | 390 | 300 | 90 | 17 |
| 2 | VB | 3 | 3 - 0 - 0 | 399 | 303 | 96 | 14 |
| 3 | VÍF | 3 | 1 - 0 - 2 | 378 | 324 | 54 | 11 |
| 4 | Neistin | 2 | 1 - 0 - 1 | 367 | 323 | 44 | 10 |
| 5 | StÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 296 | 343 | -47 | 5 |
| 6 | Søljan | 2 | 0 - 0 - 2 | 262 | 347 | -85 | 2 |
| 7 | Kyndil | 2 | 0 - 0 - 2 | 226 | 378 | -152 | 1 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kyndil | 1 | 1 - 0 - 0 | 330 | 293 | 37 | 11 |
| 2 | Neistin | 1 | 1 - 0 - 0 | 311 | 287 | 24 | 8 |
| 3 | StÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 269 | 258 | 11 | 7 |
| 4 | VÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 289 | 274 | 15 | 6 |
| 5 | KÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 270 | 315 | -45 | 5 |
| 6 | H71 | 1 | 0 - 0 - 1 | 261 | 303 | -42 | 2 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v v - t | t sett | +/- sett | sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 12 | 10 - 2 | 33 | 9 | 24 | 12 |
| 2 | Mjølnir | 12 | 9 - 3 | 30 | 12 | 18 | 10 |
| 3 | Dráttur | 12 | 6 - 6 | 24 | 23 | 1 | 8 |
| 4 | ÍF | 12 | 5 - 7 | 18 | 22 | -4 | 6 |
| 5 | KÍF | 12 | 5 - 7 | 17 | 28 | -11 | 5 |
| 6 | Fleyr | 12 | 1 - 11 | 7 | 35 | -28 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v v - t | t sett | +/- sett | sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 10 | 9 - 1 | 27 | 6 | 21 | 11 |
| 2 | Mjølnir | 9 | 8 - 1 | 24 | 4 | 20 | 9 |
| 3 | SÍ | 10 | 5 - 5 | 18 | 17 | 1 | 6 |
| 4 | Fram | 10 | 2 - 8 | 8 | 25 | -17 | 2 |
| 5 | Fleyr | 9 | 0 - 9 | 2 | 27 | -25 | 00 |


Skeiðsdepilin
FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

## Netskúlin

### - ein nýggjheit frá Skeiðsdeplinum

Kundi tú hugsað tær at fingið eitt teldukoyrikort heimanifrá ella frá arbeiðsplássinum?

- Teldukoyrikort yvir alnótina kr. 1.043,00 uttan próvtøku
- Teldukoyrikort við cd-rom kr. 399,00 uttan próvtøku
- Teldukoyrikort próvtøka sum sjálvlesandi kr. 350,00

Netskúlin er ein heimasíða við einum web-grundaðum sjálvlestrarumhvørvi til førleikamenning innan KT og einasta av sínum slag í Føroyum. Netskúlin gevur tær møguleika at taka teldukoyrikortið yvir internetið ella við cd-rom. Tær nýtist ikki at hugsa um nær og hvar tú lesur ella hvussu ofta. Tað einasta tær tørvar er ein telda.

Tá tú ætlar tær til próvtøku í einari lærugrein, kanst tú melda teg til beinleiðis frá heimasíðuni. Próvtøkan fer fram á Handilsskúlanum í Havn.

Ein stórur fyrimunur við at taka teldukoyrikortið á henda hátt er prísurin. Eitt teldukoyrikort, sum verður tikið yvir internetið kostar bert 1.043,- kr. uttan próvtøkur. Ein cd-rom við teimum 7 lærugreinunum til eitt teldukoyrikort kostar 399,- kr.

Konseptið, ið Netskúlin er grundaður á, er nógv nýtt í Danmark ,og nógv virkir og stovnar nýta henda møguleika at menna KT-støðið hjá starvsfólkinum.

Vilt tú vita meira? Ring til Maud S. Simonsen á tel. 26 50 44 ella vitja heimasíðu okkara: **www.netskulin.fo**

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
Tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo
www.skeidsdepilin.fo



TØKK





*Øllum tykkum, ið stuðlaðu Sambandsflokkinum á valinum 20. januar, takka vit hjartaliga*

SAMBANDSFLOKKURIN



Skeiðsdepilin
FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

## Diplomleiðaraleiðaraútbúgving

320 tímar, 2ára útbúgving, uml. 40 dagar, kl. 09.00-16.00, byrjar 22. mars 2004

**Endamál**

Eftir lokna leiðaraútbúgving skulu luttakararnir kunna:

- nýta serligar leiðslu- og samstarvshættir
- styrkja sambandið millum leiðslu og starvsfólk við greiðum og uppbyggjandi samskifti
- finna menningarfaktorar á virkinum og tilhoyrandi umhvørvi og nýta ítøkiligar samskipanaruppgávur
- fremja eina ábyrgdarfulla og starvsfólkamennandi leiðslu
- seta mál fyri framtíðina og seta starvsfólkini inn í hesi við ítøkiligum virkisætlanum
- finna persónligar eginleikar og harvið menningarmøguleikar hjá starvsfólkunum
- finna egnar leiðslueginleikar og menningarmøguleikar
- leiða góðskumenningina á virkinum

**Tilmelding: áðrenn 8. mars 2004**

## Grundleggjandi leiðaraútbúgving

96 tímar, 5 modul, 12 dagar í 6 mðr., kl. 08.30-16.00, byrjar 15. mars 2004

**Innihald**

- verð meira tilvitað/ur um leiðslu
- lær tey grundleggjandi leiðsluamboðini
- rættur leiðarstílur og leiðsluháttir í ymiskum umstøðum?
- hvussu megni eg at handfara samskifti og trupulleikar?
- persónlig ráðlegging - fá skil á egnari tíð

**Tilmelding: áðrenn 1. mars 2004**

## Projektleiðaraútbúgving

48 tímar, 3 modul, 6 dagar í 3 mðr. 21. og 22. apríl - 26. og 27. mai - 10. og 11. juni kl. 08.30-16.00

**Innihald**

- hvat er góð projektleiðsla? - projektleiðaraleikluturin frá byrjan til enda
- hvussu velji eg rætta leistin? Amboð hjá einum projektleiðara
- gerð av projektætlan við virksemisyvirliti, tilfeingisyvirliti og tíðarætlan
- fellur í teimum ymisku projektstigunum, hvussu sleppur tú undan?
- hvussu tú samansetir, mennir, motiverar ein projektbólk

**Tilmelding: áðrenn 2. apríl 2004**

Lesið meira um skeiðini á okkara heimasíðu **www.skeidsdepilin.fo**
Aðrar áhugaverdar skeiðlýsingar eru eisini á heimasíðuni

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
Tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo
www.skeidsdepilin.fo






**Plast-húsaklædningur**
Massiv brettir





Viðlíka-haldsfríur
Rímuligir prísir
Á goymslu hjá:
pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460